# Lada í Formel 1




*Vitalji Petrov, kappkoyrari*

Russiski forsetin Vladimir Putin hevur almannakunngjørt, at navnið Lada verður at síggja í sambandi við Formel 1 koyring.

Lada er ikki eitt bilmerki, sum verður sett í samband við Formel 1, men nú hevur russiski forsetin Vladimir Putin almannakunngjørt, at navnið Lada verður at síggja í sambandi við Formel 1 koyring. Lada skal nevniliga sponsorera Formel 1 liðið hjá Renault komandi kappingarár.

Ein orsøk til at russar sponsorera Formel 1 koyringina er at russiski kappkoyrarin Vitalij Petrov, sum tann fyrsti russarin nakrantíð, skal luttaka í hesi koyring.

Í 2008 keypti Renault 25 prosent av partabrøvunum í russisku verksmiðjuna Autovaz, som m.a. framleiðir Lada bilarnar, fyri eina milliard dollarar.

# Suðurafrikanskur elbilur









Tað sær út til, at í framtíðini verða tað ikki einans tær kendu bilverksmiðjurnar, sum fara at koma á marknaðin við elbilum. Ein so at siga ókend bilverksmiðja er Optimal Energi Ltd í Suðurafrika, sum nú sýna fram elbilin Joule á bilaframsýningum kring um í heiminum.

Joule er ein el-persónbilur við fimm sitiplássum, sum koyrir upp til 300 km upp á eina løðing og toppferðin er 130 km/t. Joule varð fyrstu ferð sýndur fram á Paris Motor Show í oktober 2008.

Bilurin er teknaður av bildesignaranum Keith Helfet, ið er best kendur fyri at hava designað fleiri modell hjá Jaguar sum t.d. XJ220 og konseptbil in Jaguar F-type.

Optimal Energi Ltd í Suðurafrika er ein nýggj verksmiðja, sum varð sett á stovn í 2005 við høvuðssæti í Cape Town.

Joule kemur á Suðurafrikanska marknaðin í hesum árinum og verður seinni frígivin til sølu á altjóða marknaðinum.

**mg**

## Johan um elbilar



**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Í sendinini Bilradio hósdagin er samrøðu við Johan Mortensen frá elbilabólkinum hjá SEV um elbilar, har hann m.a. fortelur um suðurafrikanska elbilin Joule.




# 50 ár við Ford

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Ein av teimum sum hevur verið longst í bilbransjuni í Føroyum er Hans Mortensen, sum byrjaði sum lærlingur á bilverkstaðnum hjá Wenzel Petersen í Quillingsgarði í 1955.

Hans arbeiddi seg upp til at verða goymslustjóri, sølustjóri og eisini stjóri í fyritøkuni. Tá hann hevði 50 ára starvsdag, varð hann heiðraður av drotningini fyri trúgva tænastu.

Samrøða er við Hans í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10.


*Ed Whitacre, sum er settur at bjarga kreppurakta General Motors, forvinnur 49,5 milliónir krónur um árið*

# GM stjórin fær 49 milliónir

Nýggi ovasti stjórin hjá General Motors, Ed Whitacre, sum sjálvur sigur seg lítið og einki vita um bilar, men ein hóp um økonomi, fær eina árliga inntøku upp á tað sum svarar til 49,5 milliónir krónur árliga frá General Motors, verður upplýst úr Detroit.

Ed Whitacre, sum er fyrrverandi stjóri á telefonfelagnum AT&T, er longu byrjaður at gera stórar broytingar í allari GM-konsernini. Eisini í sambandi við Opel-Vauxhall í Evropa, sum stýrið í kreppurakta General Motors hevur samtykt at hava eftir.

Í USA er tað vanligt, at borgararnir í landinum fáa at vita, hvussu nógv stjórar í vinnulívinum forvinna. Hóast lønarupphæddirnar eru stórar, hava fólk í USA ikki ilt av tí, men makta stjórarnir ikki sína uppgávu, og tað byrjar at ganga illa, so yvirliva stjórarnir ikki leingi í starvinum.